# Tvey av Kamarinum spæla á Summar Festival- inum

**Undangongufólkini í føroyskum tónleiki fara at spæla á Summar Festival- inum 50 ár eftir, at tey byrjaðu at spæla alment. Tey av Kamarinum eru ein søga fyri seg í føroyskum tónleiki**

SUMMAR- FESTIVALUR

Millum bólkarnar, sum fara at spæla á Summar Festivalinum í august mánað, verða Tvey av Kamarinum, sum mugu metast sum verulig undangongufólk í føroyskum tónleiki.

Í ár eru tað 50 ár liðin, síðani Tey av Kamarinum byrjaðu at spæla alment, og síðani hava tey verið ein týðandi partur av føroyskum tónleikalívi. Og tey spæla framvegis. Nú kalla Nicolina Jacobsen og Eyðbjørn Jakobsen seg fyri Tvey av Kamarinum, og tey hava júst verið í studio og spælt tónleikin inn til eina nýggja fløgu, sum kemur út í næstum.

Nicolina Jacobsen hevur í eitt mannaminni skrivað sangir, sum føroyingar veruliga hava tikið til sín. Hvør kennir ikki sangir sum Kvøldarsólin, Tá kvøldið kemur, Eg hugsi um teg, Trygdareiðin og Í dreymalandi.

Um stutta tíð koma Tvey av Kamarinum við einari nýggjari fløgu, og á hesari fløgu, sum hevur fingið heitið Dámliga Gøtan, verða 13 sangir.

Summir av hesum sangum og aðrir eldri sangir verða at hoyra, tá ið Tvey av Kamarinum fara at spæla á Summar Festivalinum fyrsta vikuskiftið í august.

Páll á Reynatúgvu, Tjóðveldisflokkurin:

# - Í andsøgn við vallyftini hjá javnaðarflokkinum

**Løgtingsmaðurin hjá tjóðveldisflokkinum, Páll á Reynatúgvu, heldur, at sparningarnar á umsorganarøkinum standa fullkomiliga í andsøgn við valboðskapinum hjá javnaðarflokkinum um "tað góða samfelagið"**

Sparingar
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Páll á Reynatúgvu heldur tað verða burturvið, at skotið verður eftir Almannastovuni fyri at spara 44 prosent á rakstrarstuðlinum til umsorganararbeiði, tí tað er landsstýrismaðurin, ið hevur ábyrgd av at tryggja fíggjarkarmarnar á økinum.

### Ófantaligt og klossut

At Almannastovan, nú árið er nærum hálvrunnið, kemur við boðunum at stuðulin verður skorin niður í nærum eina helvt, heldur Páll á Reynatúgvu verða ótrúliga ófantaligt og klossut.

- Vit mugu minnast til, at størsti parturin av útreiðslunum hjá mongu tilhaldunum kring landið eru lønarútreiðslur, og tí sigur tað seg sjálvt, at neyðugt verður at siga fólk úr starvi. Trupulleikin er so tann, at hesi fólk ivaleyst hava eina uppsagnartíð upp á millum tríggjar mánaðar og hálvt ár, og tí er so ómetaliga lítil møguleiki fyri at spara nakað í hesum kalendaraárinum, sigur Páll á Reynatúgvu.

Løgtingsmaðurin sigur, at tilhaldini hava ómetaliga stóran týdning fyri eldru borgararnar í samfelagnum, og hann ivast ikki í, at tey eisini hava ein fyribyrgjandi leiklut.

- Tað er einki at ivast í, at tilhaldini økir munandi um lívsgleðina hjá teimum gomlu, og eg eri sannførdur um, at hetta eisini seinkar gongdini hjá pensionistunum móti einum røktarplássi og harvið størri útreiðslum fyri landskassan, sigur Páll á Reynatúgvu.

### Illa raðfest

Sandoyar-tingmaðurin heldur tað verða illa raðfest, at spart verður á einum slíkum stað, har so nógv fólk verða rakt og gjørd kedd, tí at játtanin ikki veksur samsvarandi við vøksturin í tilhaldsplássum.

- Hetta er ein so lítil upphædd, ið tað snýr seg um. Játtanin til umsorganararbeiði er einans 4,8 milliónir, og hetta er ikki nøkur stór upphædd í hesum høpi. Hans Pauli Strøm veit, at hann hevur eina játtan til umsorganararbeiði, og hann má arbeiða fyri, at játtanin verður hækkað, soleiðis at tað ber til at halda fram við tilboðunum til tey gomlu í samfelagnum, sigur Páll á Reynatúgvu.



*Tingmaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum, Páll á Reynatúgvu, sigur at javnaðflokkurin brýtur síni vallyfti, nú spart verður í stuðlinum til tilhaldspláss og onnur dagtilboð til pensionistar.*
*Savnsmynd*

Páll á Reynatúgvu sigur seg minnast, tá ið hann sjálvur sat sum landsstýrismaður á hesum øki, at javnaðarflokkurin var ógvuliga atfinningarsamur, tí táverandi samgonga einans útvegaði 123 tilhaldspláss. Javnaðarflokkurin kravdi, at talið skuldi verða 250, men nú teir sjálvir sita við ábyrgdini, er støðan ein onnur, sigur Páll á Reynatúgvu.

Somuleiðis heldur tjóðveldistingmaðurin, at politikkurin hjá samgonguni á hesum øki stendur fullkomiliga í andsøgn við vallyfti um "tað góða samfelagið", sum javnaðarflokkurin proklameraði undan seinasta løgtingsvali.

# Svøk reinsdjór í Gøtu



Danski bólkurin Afenginn luttekur á G! Festivalinum við sínum etno bastard tónleiki, sum teir sjálvir rópa tað. Tónleikurin er eitt bland av fólkatónleiki, klassiskum og norðurlendskum tónleiki væl blandað við balkanskum tónleiki.

Bólkurin fær allastaðni ótrúliga góð viðmæli og ummæli, eisini aftan á seinastu framførsluna, sum var á Spot festivalinum í Aarhus. Sambært Jón Tyril, fyriskipara, er bólkurin pillsvakur á pallinum, og er ein tann besti livebólkurin, sum Jón hevur sæð.

Fyrsta fløgan hjá bólkinum Retrograd kom út á TUTL, og bólkurin hevur fyrr spælt í Føroyum. Teir upptóku eisini sítt fyrsta sjónbandalag í Føroyum, tá runnu teir runt ílatnir sum reinsdjór í haganum.

At døma eftir ummælum og heimasíðu, er hetta ein løgin bólkur og verður uttan iva ein serlig uppliving á G!

**-nud**